# Gongur rætta leið hjá ALS

*Útgjaldið hjá ALS var minni í fjør, enn árið fyri. Betraða búskaparstøðan í landinum sæst eisini sftur í eini lækking í talinum av teimum, ið fáa arbeiðsoysisstuðul og Føroyar hava í dag eitt sonevnt náttúrligt arbeiðsloysi. ALS hevur eisini eina støðugt vaklsandi eginogn og 1. juli verður ALS gjaldið sett niður*

DAGFINN OLSEN

Í samband við almannakunngerðina av roknskapinum fyri 1999, boðaði Arbeiðsloysisskipanin mánadagin fjølmiðlum til kunnandi fund undir heitinum; Hvagar gongur leiðin?

Forkvinnan í stýrinum fyri ALS, Karin Kjølbro, segði, at fyrstu 4 árini hjá ALS, var mest talan um eldsløkking og andahjálp. Hesa mynd nýtti hon um støðuna hjá stovninum, sum ofta var í andgletti, men sum lítið hevur verið at hoyrt um seinnu árini. Karin Kjølvro legði í hesum sambandi dent á, at í dag er talan um ein vælvirkandi stovn.



*ALS hevði mánadagin kunnandi fund um virksemi og ætlanir. Elisabeth Gaardbo, stjóri, Karin Kjølbro, forkvinna í stýrinum fyri ALS og Regin Jacobsen, fíggjarleiðari*
***Myndir: Dagfinn Olsen***

### Gjaldið lækkar

Stýrið hevur gjørt av at lækka inngjaldið frá 1. juli.

Í 1999 var samlaða ALS gjaldið 4% í mun til 4,5% árið fyri. Hóast hetta hevði Arbeiðsloysisskipanin á leið somu inntøkur, sum árið fyri, samstundis sum eginogin er støðugt vaksandi. Í 2000 verður ALS gjaldið sett niður við 1%, so at tað frá 1. juli verður 3% fyri A lønarmóttakarar og 1,5 fyri tey, ið rinda A inntøkur.

Karin Kjølbro nevndi eisini, at stýrið setti sær fyri at rinda skuldina, ið skipanin hevði. Hetta er nú gjørt. Eisini skuldi inngjaldið setast niður. Hetta verður nú eisini gjørt.

Ein afturvendandi setningur í prátinum um ALS er, at skipanin er øðrvísi, enn vit kenna hana í grannalondunum. T.d. eru slíkar skipanir ofta alment fíggjaðar. Tað er ALS ikki.

### Byggja upp eginogn

Nýggi stjórin í ALS, Elisabeth O. Gaardbo, byrjaði á stovninum í 1996. Hon nevndi tær mangan turbolentu tíðirnar, men fegnaðist um, at stovnurin nú er í ferð við at byggja upp eina eginogn, so skipanin er før fyri at standa ímóti møguligum samfelagsligum bakkøstum.

Eginognin er í dag góðar 192 milliónir krónur.

Nýggi stjórin staðfesti, at Føroyar í dag hava, tað sum tey í øðrum londum rópa eitt náttúrligt arbeiðsloysi, t.v.s. eini 3 -5%. Mett verður, at 3% fáa frá ALS, 1% frá »fiskavirkisskipanini« og 1% frá Almannastovuni.

Rakstarúrslitið hjá ALS er betrað og Karin Kjølbro nenvdi, at ALS er soleiðis háttað, at samfelagsgongdin merkist tvífalt í ALS.

Elistabeth Gaardbo minti á, at ALS hevur minkað um starvsfólkatalið við eini 30%, Her er talan um, at ikki so nógv arbeiðsleys eru í skipanini nú og eisini er effektivisering farin fram.

Elisabeth Gaardbo segði m.a., at fyrr komu fólk til samrøðu hjá ALS ein og ein. Nú koma fólk í bólkum og verða kunnaði um møguleikar og rættindi. Hetta er bæði lættari og so verður eisini roynt at avmystifiserað ALS. Málsviðgerðin gongur eisini skjótari.

Umframt, at færri eru arbeiðsleys í dag, so eru fólk eisini styttri arbeiðsleys, í mun til fyrr.

Á ALS eru tey eisini byrjað t kalla fólk inn, tá tey hava verið arbeiðsleys í meira enn hálvt ár. ALS hevur t.d. førleikagevandi skeið at bjóða, men tað stendur til hin einstaka, um hann tekur av.

Eisini er ALS farið undir eina kanning av arbeiðsmarknaðinum, t.d. fyri at finna útav, á hvørjum fakøkjum tørvur er á arbeiðsmegi. Soleiðis verður eisini lættari at veita arbeiðsleysum førleikagevandi tilboð. Kanningin verður gjørd saman við Fróðskaparsetrinum.

Seinni í ár kemur gongd á eina arbeiðsávísing á internetinum. Har kunnu bæði arbeiðsgevarar og arbeiðstakarar skráseta seg.

### Roknskapurin

Fíggjarleiðarin, Regin Jacobsen, legði roknskapin og hagtøl fram.

Í 1999 vóru inngjøldini til skipanina 170,4 milliónir, í mun til 177,3 milliónir í 1998. Samlaða útgjaldið var eisini minni. Í 1998 var tað 98,1 milliónir og í 1999 var tað 88 milliónir.

Hóast minkaðar inntøkur, er rakstrarúrslitið betri í ár, enn undanfarna ár. Her koma øktu lønarútgjaldingarnar í samfelagnum inn í myndina.

Mett hevur verið av stórum týdningi, at skipanin stimbrar eginognina, so standast kann ímóti, um samfelagið verður fyri bakkøstum. Sagt verður í viðmerkingum til roknskapin, at til hóskandi eginogn er fingin til vega, verður roynt at leggja skipanina soleiðis, at fíggjarlig javnvág er og sum einans hevur eina øking av gjaldførinum, svarandi til prísvøksturin í samfelagnum.

Umframt roknskapin, so legði Regin Jacobsen nógv og áhugaverd hagtøl á borðið. Lækking kundi staðfestast í talinum av arbeiðsleysum, men samstundis kundi staðfestast, at vandabólkar eru t.d. ófaklærdar kvinnur og fólk, ið eru komin upp í árini. Býtið millu menn og kvinnur, ið fáa arbeiðsloysisstuðul er soleiðis: 65% eru kvinnur og 35% eru menn

Vaksandi virksemi í Føroyum, síðani kreppuna fyrst í 90 árunum, hevur havt fallandi arbeiðsloysi við sær. Væntað verður ikki, at virksemið minkar í 2000 og sostatt kann roknast við, at arbeiðsloysið minkar støðugt.






**Tal av móttakarum av vanligum arbeiðsloysisstuðli, býtt eftir landspørtum**




**Arbeiðsleys /ALS og Almannastovan) í mun tilmatta arbeiðsstyrki**




*Talið av arbeiðsleysum er minkandi í Føroyum*



**Arbeiðsleys við útgjaldi frá 1997 til skeið 9 í 2000 (vanlig)**






*Elisabeth Gaardbo, stjóri í ALS, fegnast um, at tað gongur rætta leið við at byggja upp eina eginogn hjá Als og at talið av arbeiðsleysum nú kann kallast náttúrligt arbeiðsloysi*



*Karin Kjølbro: Stýrið fyri ALS setti sær fyri at rinda skuldina hjá skipanini. Hetta er hent og somuleiðis verður nú inngjaldið sett niður, sum ætlað*

| 1.000 kr. | 1999 | 1998 | 1997 |
|---|---|---|---|
| **RAKSTRARROKNSKAPUR** | | | |
| Inngjøld | 170.446 | 177.266 | 195.187 |
| Útgjøld v.m. | 88.048 | 98.134 | 113.819 |
| **Teklniskt úrlit** | **82.398** | **79.132** | **81.368** |
| Lønir v.m. | 6.571 | 5.649 | 7.499 |
| Kostnaðir | 5.310 | 6.134 | 6.875 |
| **Útreiðslur íalt** | **11.881** | **11.784** | **14.374** |
| **Úrlit áðrenn av skrivingar** | **70.517** | **67.349** | **66.994** |
| Avskrivingar | -605 | -1.010 | -534 |
| **Úrslit áðrenn fíggjarpostur** | **69.911** | **66.339** | **66.459** |
| Fíggjarinntøkur | 3.103 | 6.213 | 3.470 |
| Fíggjarútreiðslur | -846 | -1.413 | -3.788 |
| **Fíggjarpostar, netto** | **2.257** | **4.800** | **-317** |
| **Úrslit av vanligum rakstri** | **72.169** | **71.139** | **66.142** |
| Serligar inntøkur/útreiðslur | 0 | 4 | 277 |
| **Rakstrarúrslit** | **72.169** | **71.142** | **66.419** |
| **FÍGGJARSTØÐA PR. 31. DESEMBER** | | | |
| **Støðisfæ íalt** | **1.425** | **1.028** | **611** |
| Tíðaravmarkingar og forútgoldið | 77 | 385 | 390 |
| Skuldarar | 2.877 | 2.963 | 9.554 |
| Lánsbrøv | 125.714 | 76.087 | 0 |
| Tøkur peningur | 95.448 | 92.959 | 101.782 |
| **Umferðarfæ íalt** | **224.116** | **172.394** | **111.725** |
| **Aktiv íalt** | **225.542** | **173.422** | **112.337** |
| **Passiv** | | | |
| Stovnsfæ | 93.840 | 93.840 | 93.840 |
| At flyta til komandi ár | 98.189 | 26.020 | -45.122 |
| **Eginogn íalt** | **192.029** | **119.860** | **48.718** |
| **Avsetingar íalt** | **30.000** | **30.000** | **30.000** |
| Skuldugur arbeiðsloysisstuðul | 2.624 | 2.347 | 5.142 |
| Ognarar | 829 | 1.730 | 1.588 |
| Tíðaravmarkingar | 59 | 537 | 524 |
| Lán, Arbeiðmarknaðareftirlønargrunnurin | 0 | 18.947 | 26.364 |
| **Skuld íalt** | **3.512** | **23.561** | **33.619** |
| **Passiv íalt** | **225.542** | **173.422** | **112.337** |

*ALS er í dag ein vælvirkandi skipan, sigur forkvinnan í stýrinum, Karin Kjølbro. Hetta sæst eisini sftur í roknskapinum og eginognin er í dag 192.029 milliónir krónur*

# Hava tað gott í ódnarveðrinum

*Føroyingar eru á fyrsta sinni við á Special Olympics og hóast ódnarveðrið í Hálandi, veit væl við hjá teimum*

Special Olympics eru leikir fyri menningartarnað og føroyingar luttaka í hesum døgum á fyrsta sinni. 2.500 ítróttarfólk úr 27 londum luttaka og ÍSB hevur sent 8 ítróttarfólk avstað. Svimjarar eru Durita Strøm, Halla Poulsen , Símun P. Zachariassen og Jimmy Nielsen. Rennarar eru Unn Mortensen, Jóhanna Maria Niclasen, John Joensen og Jonhard Haraldsen.

Tá vit prátaðu til Hálands í gjár fyrrapartin, visti væl við hjá føroysku luttakarunum. Ódnarveður hevur verið á leiðini, so sjálv setanin varð avlýst, men tiltak fór fram undir taki ístaðin.

Bólkingar fara fram eftir fyrstu innleiðiandi umførini. Tá vit prátaðu høvdu genturnar runnið 100 metrar og tað gekk væl. Eisini høvdu genturnar svomið og væl gekk. Finala skuldi vera í gjárkvøldið. Seinnapartin í gjár skuldu John og Jonhard renna 5000 metrar. Eins og mangar aðrar, verða finalur í renning hósdagin ella fríggjadagin.

Nógvar rættiligar ítróttarstjørnur eru á stevnuni og eftir ætlan skuldu føroysku luttakararnir í gjár hitta fimleikastjørnuna Nadju, ið var frammi fyri nøkrum árum síðani

*- do -*


